# Vit hava bara ein marknað

**Frá fyrsta degi hava vit havt eina globala vøru á einum globalum marknaði. Tí eru vit sloppin undan fleiri av trupulleikunum, sum kappingarneytarnir stríðast við í altjóðagerðini, sigur føroyski stjórin á Bullguard, Heini Zachariassen. Í kapping við altjóða risar sum Norton Internet Security, er felagið vaksið við rúkandi ferð. Eitt úrslit, sum nú hevur sett Heina á listan yvir mest evnaríku vinnulívsfólkini í Danmark Heini Zachariassen verður við á KT-stevnuni í Norðurlandahúsinum**

VINNULÍVSMAÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Um føroyingar hava áhuga í at hoyra frá einum landsmanni, sum veruliga hevur gjørt seg galdandi í donskum KT-vinnulívi, so er at lurta eftir hoyvíkingunum Heina Zachariassen, sum á KT-stevnuni fer at halda fyrilestur fyri áhugaðum. Pílurin hjá hoyvíkinginum, sum nú býr í Kastrup, hevur at kalla bert peiggjað beint uppeftir, síðani skúlagongdin var liðug fyri níggju árum síðani. Hansara Curriculum Vitae er kanska ikki so víttfevnandi – eina BA innan handil og fýra starvssetanir.



*Føroyski stjórin*

Men hóast nógv ivaleyst kunnu vísa longri útgávur av slagnum fram, so má uppgangandi stigin sigast at vera imponerandi. Somikið imponerandi, at hann í dag verður mettur sum ein av komandi kanónunum innan danskt vinnulív.

Fyrilesturin hjá Heina verður kanska tann mest áhugaverdi fyri føroysk KT-fólk. Í stuttari viðmerking sigur Heini, at hann í hugtakinum 'gloymi heimamarknaðin', sum er heitið á fyrilestrinum, leggur dent á, at um vit ætla at kappast við fyritøkur uttanlands, mugu vit serkunna okkum innan eitt øki. Í Danmark er vanligt at byrja at selja skipanir á heimamarknaðinum fyri síðan at fara uttanlands við loysnunum:

– Men hetta ber ikki til í Føroyum, tí marknaðurin er alt ov lítil til serkønar kt-fyritøkur. Um vit ælta okkum uttanlands, mugu vit frá fyrsta degi hyggja úteftir og gloyma heimamarknaðin, sigur Heini Zachariasen.

### 20-faldað starvsfólkatal

Tað er í øllum førum niðurstøðan hjá Berlingske Nyhedsmagasin, sum í eini serligari silvurútgávu í dag setir nøvn á tey 100, sum blaðið metur hava størst potentiali at røkka heilt upp á ovastu tindarnar. Einasta treytin fyri at vera millum hesi 100 er navnabrævið, sum í mesta lagi skal vera 35 ára gamalt. Í aðrar mátar eru tað úrslitini – og einki annað – sum telja.

– Orsøkin til, at eg eri komin við í hendan hópin, er fyrst og fremst hon, at nevndarformaðurin í Bullguard, har eg starvist, hevur skotið mítt navn upp fyri blaðnum. Eg varð so uppringdur av teimum, og eftir eina samrøðu, sendi eg teimum mítt CV. Og so hava tey á blaðnum gjørt av, at hetta var nóg mikið, sigur Heini sjálvur um heiðurin, sum ein slík nominering er.

Men hvørji eru so úrslitini, sum hava prógvað rættleikan í hesi avgerð?

– Eg gangi bara útfrá, at tað er vøksturin í fyritøkuni hjá okkum, sum hevur gjørt tað. Tá eg gjørdist partur av Bullguard fyri fýra árum síðani, vóru vit tríggir mans í starvi. Í dag telur fyritøkan 60 fólk, og higartil hava vit á hvørjum ári tvífaldað umsetningin. Nakað sum aftur er málið í ár, staðfestir hann.

Og leggja vit afturat, at hesin vøkstur er komin í knallharðari kapping við altjóða risar sum eitt nú Norton, so skerst ikki burtur, at talan er um imponerandi avrik higartil.

### »Born global«

Hóast persónurin í horninum framvegis tykist vera júst tann sami hoyvíkingurin, sum grannarnir við Nicolaj Mohrs gøtu munnu minnast frá barnaárunum, so skerst ikki burtur, at talan er um ein sera málrættaðan vinnulívsmann.

Ofta verður tikið til, at bestu úrslitini verða rokkin við sera einføldum arbeiðshættum, og spurdur, staðfestir Heini, at tað sum so ikki liggur nakað loyndarmál handan úrslitini hjá sær og Bullguard.

– Persónliga haldi eg, at tað hevur eydnast mær sera væl at finna góð fólk. Fólk, sum eg havi lætt at samstarva við, og sum tað eisini hevur eydnast mær at motivera til at fremja ein góðan innsats.

– Tosar tú um fyritøkuna hjá okkum, so er okkara størsti fyrimunur helst, at vit eru globalir allan vegin ígjøgnum. Verður tosað um virus-verjur, so er allur heimurin ein marknaður, og hetta ásannaðu vit alt fyri eitt. Tí er okkara framleiðsla ikki býtt upp í heima- og útflutningsmarknað, sum hann er tað hjá fleiri øðrum. Sjálvur plagi eg at siga, at hóast fleiri fyritøkur hava ein útflutningsstjóra, so havi eg framvegis ikki ánilsi fyri, hvat ein slíkur ger!

– Skal tað lýsast sum eitt hugtak, so haldi eg, at hetta verður sera væl gjørt í eini uppgávu, sum ein bólkur av lesandi gjørdi um Bullguard. Tey skrivaðu, at vit vóru »Born Global«, og tað er júst tað, sum vit eru. Tá vit frá fyrsta degi hava verið globalir, eru vit eisini slopnir undan nógvum av teimum umleggingum, sum fleiri fyritøkur stríðast við í dag.

– Eisini á starvsfólkaøkinum eru vit globalir. Ofta verður tað tikið illa upp, tá arbeiðspláss verða flutt av landinum, men heldur ikki her hava vit havt trupulleikar. Vit gjørdu tíðliga av at stovna eina menningardeild í Bucharest í Rumenia. Hetta tí vitunarstøðið innan KT er høgt her, samstundis sum lønarkostnaðurin er munandi lægri, enn hann er í eitt nú Danmark.

– Hartil hava vit eisini eitt sera globalt produkt, sum ikki krevur tær stóru broytingar, tá tað skal nýtast í ymsu londunum. Tað ræður sum so bert um at gera brúkaraleiðbeiningar og brúkaraflatu á málinum hjá brúkarunum. Og tað er so eisini nakað, sum vit støðugt hava lagt okkum eftir. Soleiðis eru pakkarnir hjá okkum í dag at fáa á 15 ymiskum málum, og nú vit hava gjørt serstaka útgávu til fartelefonir, hevur hendan frá byrjan 28 ymisk brúkaramál.

### Fartelefonir næsta hittið

Júst marknaðurin við virusverjum til fartelefonir er nakað, sum Heini sjálvur sær sera stórar møguleikar í komandi árini. Møguleikar, sum eisini eiga at verða troyttir, um felagið áhaldandi skal røkka sínum »benchmark« um at tvífalda søluna á hvørjum ári.

– Fartelefonir eru longu nú í ferð við at líkjast einum veruligum PC alt meira. Samstundis er marknaðurin í dag soleiðis háttaður, at talan bert er um tveir ymsar platformar, sum tykjast vinna allan marknaðin. Fortreytin fyri at eitt virus-álop veruliga kann gera um seg, er júst standardisering. Og tí meta vit heilt avgjørt, at marknaðurin um heilt stutta tíð fer at eftirspyrja okkara produktum á hesum marknaðinum, sigur altso føroyska ískoyti til bólkin av ungum stjørnuskotum innan danskt vinnulív.

## Errin og fegin

Tað er nú ein vika síðani, at Heini sjálvur varð kunnaður um, at hann er millum tey 100, sum eru útvald til sonevndu talent-jagtina hjá Berlingske.

Tí hevur hann líka sum havt møguleika at venja seg við tankan, og hann viðgongur blankt, at hann er sera fegin um tað viðurkenning, sum liggur í hesum.

– Tað prógvar í øllum førum, at eg havi rokkið nøkrum málum higartil. Samstundis gevur tað sjálvsálit, tí eg eri hóast alt bara 33 ár. Soleiðis skuldi eg enn havt nógv góð ár eftir í mær, og í so máta kann hetta bara geva íblástur.

Men er eitt slíkt herðaklapp ikki eisini nakað, sum tú kanst brúka á tínum visit-kortið, tá nýggjar kontaktir skulu skapast í framtíðini?

– Tað kann tað helst verða í ávísum førum. Men tað, sum eg fegnist mest um, eru reaktiónirnar, sum hetta hevur avleitt millum tey, sum eg kenni. Tá eg havi sagt familju og vinum frá, at eg verði nevndur í hesum høpi friggjadagin, hava øll svarað mær positivt. Orð sum »hetta hevur tú uppiborið« og »tað gleðir meg virkeliga« eru kanska tað, sum eg eri mest glaður um í hesum. Serstakliga, tá tey eru komin frá fólki, sum standa mær nær, sigur framvegis jarðbundni hoyvíkingurin.

**-mørk**

## FAKTA UM HEINA

| | |
|---|---|
| Navn: | Heini Zachariassen |
| Føddur: | 20. juli 1972 |
| Hjúnastøða: | Giftur Maibritt Zachariassen |
| Børn: | Barbara (8 ár), Bastian (5 ár) og Paula (6 mðr.) |
| **Útbúgving** | |
| 1991 | Avlærdur í Fossbankanum |
| 1994 | HH-prógv í Havn |
| 1997 | BA í handilsumsiting á Handilsháskúlanum á Vestursælandi |
| **Starvsroyndir** | |
| 1997-2000 | Annar av eigarunum av Ecperience I/S - programmering og webdesign |
| 2000-2002 | Ein av stovnarunum og IT-ovasti á Virus112 A/S. Virus112 A/S varð í desember 2000 selt til EuroTrust |
| 2002-2006 | Stjóri á Bullguard Ltd. |
| 2006- | Forstjóri á Bullguard |

## FAKTA UM BULLGUARD

*www.bullguard.com*



Bullguard varð stovnað av Morten Lund og Theis Søndergaard í 2001. Visjónin hjá teimum báðum var at skapa eina vøru, sum kundi verja brúkaran á alnetinum. Fokusbólkurin var frá byrjan breiðbandskundin, sum alla tíðina situr á netinum, og sum soleiðis støðugt er hóttur av virus, hackarum og sonevndu internet-ormunum.

Vøruskráin fevnir í dag um fýra kjarnuøki. Virus-verjur, Firewalls, Spam-filtur og On-line backup. Hartil er felagið júst komið á marknaðin við serligari virus-verju til fartelefonir.

Heini gjørdist partur av fyritøkuni í 2002. Hetta var um sama mundið, sum fyrsta útgávan av Bullguard varð send á marknaðin. Longu árið eftir hevði felagið fleiri enn 3 mió brúkarar. Talið av brúkarum veðrur í dag mett til 15 mió.

Felagið hevur í dag 61 fólk í starvi. Av hesum starvast 42 í Rumenia, 15 í Danmark og 4 í London, har felagið eisini er skrásett.